# Bjørg ber bløð

**Í eitt hálvt ár hevur 14 ára gamla Bjørg Klakstein úr Klaksvík borið Dimmalætting og Sosialin út til haldarar hvørt fríggjakvøld. Frá mánakvøldinum av verður hetta víðkað til at verða tveir og tríggjar dagar um vikuna. Tað dámar henni væl**

BLAÐÚTBERING
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*




*– Tað er líkamikið, hvussu veðrið er. Um tað regnar, so plaga vit at hava posar við, so bløðini ikki blíva so vát, sigur 14 ára gamla Bjørg Klakstein, sum ber bløð út á einari av teimum átta rutunum, sum eru í Klaksvík*

**Klaksvík:**
Tað er fríggjakvøld. Klokkan er farin av hálvgum átta. Bjørg og mamma hennara, Bergfríð, sita og bíða eftir, at bilurin við bløðunum skal koma.

Tað hava tær gjørt hvørt fríggjakvøld í meira enn seks mánaðir nú. Bjørg hevur fingið eina fasta rutu at bera bløð út, og mamma hennara hjálpir henni fegin.

– Tað eru 55 haldarar á hennara rutu, og bløðini eru so avgjørt ikki løtt, so eg hjálpi henni gleðiliga. Tað tekur heldur onga tíð, sigur Bergfríð.

Møggurnar báðar plaga at taka tíð, tá tær fara út við bløðunum. Bjørg sigur, at tað skjótasta tær hava klárað tað uppá er 25 minuttir.

– Men vanligt tekur tað millum ein hálvan og ein tíma, sigur hon skilagóð.

Flennandi greiða tær frá, at í fyrstuni plagdu tær at krossa av á yvirlitinum yvir haldararnar, hvør hevði fingið og so framvegis. Men tað nýtist teimum ikki longur, tí tær duga uttanat, hvør heldur hvørt blað á rutuni hjá Bjørg.

## Full ferð á

Meðan prátið gongur aftur og fram, gongur hurðin. Nú eru tað bløðini, sum eru komin. Bjørg tekur ein saks í hondina, og so tekur hon bløðini úr posanum og klippir bondini av, meðan mamma hennara kannar um nakrar broytingar eru á yvirlitinum.

So bera tær øll bløðini út í bilin og fara at gera seg klárar til at fara.

Klokkan er júst farin av átta, tá bilurin rullar út úr túninum, og rutan er púra klár. Tær koyra hartil, sum hon byrjar. Bjørg tekur nøkur bløð og leypir úr bilinum. Hon rennur niðan millum nøkur hús og tveitir bløðini í postkassan hjá fólki. Meðan koyrir Bergfríð longur og fer sjálv við nøkrum bløðum. Bjørg nær so mammuna aftur, og so koyra tær aftur eitt petti. Soleiðis gongur tað allatíðina. Bjørg fer av fyrst og rennur so aftaná við bløðum til teir ymsu haldararnar.

– Hon rennur so skjótt. Hon plagar eisini at taka trappur og brekkur, sigur Bergfríð skemtandi.

Tað er væltilrættislagt, hvør tekur hvat hús og hvørji bløð. Har er ongin slingur í valsinum, og alt gongur væl.

Bjørg sigur, at tað eru ikki øll, sum hava postkassa. Tá plagar hon bara at stinga blaðið millum rimarnar á hurðini ella tveita tey inn í gongina.

– Summi vilja hava meg at leggja tað á eitt ávíst stað. Til dømis hjá einari konu veit eg, at um tað er stongt, so skal eg leggja blaðið inn í hjallin, greiðir hon brosandi frá, áðrenn hon hvørvur niðan millum tvey hús í myrkrinum.

Bløðini fækkast í tali á baksetrinum á bilinum. Men nú líður eisin móti endanum. Hetta var sum eitt vanligt fríggjakvøld. Tað tók okkurt um trý korter at bera teimum 55 haldarunum bløðini.

## Meira at gera

Men frá komandi viku skal Bjørg byrja at bera út aðruhvørja viku trý kvøld og aðruhvørja tvey. Tá koma tey eisini nakað fyrr við bátinum, greiðir Bergfríð frá.

– Nú koma tey túrin hálvgum sjey av Leirvík, men frá komandi viku av, haldi eg, at tey fara at koma túrin frammanundan við Sam. Tað verður deiligt, tí so verður tað eitt sindur fyrr, heldur hon fyri.

Bjørg heldur, at tað er deiligt at fáa meira at gera.

– Tað er gott at gera meira, og man fær eisini tað meira í løn, sigur hon, men leggur so afturat, at hon veit ikki, hvussu longi hon fer at tíma hetta afturat. Bjørg hevur hugsað um at finna sær annað arbeiði, men so sigur hon, at tá ein hugsar um tað, so er at bera bløð út ikki ein langur arbeiðsdagur, og hon er glað fyri sína løn.

– Tað er lekkurt at vinna sína egnu pengar, sigur Bjørg Klakstein í tí hon fer við teimum seinastu bløðunum hetta fríggjakvøldið. Klokkan nærkast níggju, men nú hevur hon frí til týskvøldið, tá hon og mamma hennara aftur fara avstað.




*Bløðini júst komin inn um hurðina, so nú er bara at gera klárt og fara til arbeiðis*



*Bjørg er fegin um at fáa góða hjálp at bera bløðini út*



# Íslandskvotan bjargar línuflotanum

**Mánadagin landaði línuskipið, Polarstjørnan, í Klaksvík. Hetta er annar túrurin hjá teimum undir Íslandi, har teir koma aftur við fullum skipi. Fyrra túrin høvdu teir stívliga 190.000 pund, og hendan túrin er veiðan nøkulunda hin sama, eini 180.000-190.00 pund**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Polarstjørnan aftur við góðum fongi undan Íslandi. Hetta er annar túrurin á rað, at teir koma aftur við fullum skipi. Nú er kvotan hjá teimum undir Íslandi so gott sum liðug*

Línuskipini hava gjørt tað gott undir Íslandi í ár. Væl av fiski hevur verið at fingið, og sølurnar hava verið rímiliga góðar. Fitt av toski og hýsu er uppi í veiðini, og tá ið prísirnir á hesum fiskasløgum eru rímiliga góðir í løtuni, hava íslandstúrarnir havt stóran týdning hjá línuflotanum, nú minni hevur verið at fingið undir Føroyum.

Polarstjørnan, sum Guttormur og Per Simonsen eiga, er nú so gott sum liðug við sína kvotu undir Íslandi.

– Vit hava gjørt tveir túrar har yvir. Fyrra túrin høvdu vit 192.000 pund, og nú skipið aftur er á Klaksvík, er veiðan umleið hin sama, eini 180.000-190.000 pund, sigur Guttormur.

## 12 setur

Polarstjørnan landaði av seinna túrinum í Klaksvík mánadagin.

Skipari á fyrra íslandstúrinum var Gottormur sjálvur, og hendan túrin hevur sonur Gottorm, 28 ára gamli Jóhan Simonsen, verið skipari.

Teir høvdu 12 setur hvønn túrin.

Umframt Polarstjørnuna, sum Gottormur og Per keyptu fyri stívliga 10 árum síðan, eiga teir eisini línuskipið, Helenu, fyrrverandi Fuglfirðing, sum teir keyptu í mai/ juni mánaða síðsta ár. Helena er eisini undir Íslandi, og sambært Guttormi gongur eisini hampiliga væl hjá teimum har yviri.

Helena er styttri enn Polarstjørnan, men hon er nakað breiðari. Skipið lastar eini 170.000 pund av ísfiski.

## Stóran týdning

Guttormur sigur, at íslandskvotan hevur stóran týdning fyri línuskipini – ikki minst, nú línufiskiskapurin undir Føroyum er vorðin meira "normalur" aftur, sum hann tekur til.

Í summar og í heyst hevur lítil og eingin toskur verið at fingið undir Føroyum, og tí kemur íslandskvotan væl við.

– Polarstjørnan hevur loyvi at fiska 217 tons undir Íslandi, harav í mest lagi 25% kann vera toskur.

Hann sigur, at veiðan hjá Polarstjørnuni hesar báðar túrarnar hevur verið brosma, longa, toskur og hýsa.

– Tann fyrra túrin seldu vit fyri góðar 9 krónur í miðal fyri kilo, men nú prísurin á toski og hýsu er batnaður, vænta vit, at miðalprísurin hendan túrin verður nakað hægri, sigur Guttormur.

## Óvanligt ár

Guttormur Simonsen sigur, at hann ongantíð áður hevur upplivað slíkan fiskiskap undir Føroyum sum seinasta ár.

– Hetta var eitt óvanligt ár, bæði til fiskiskap og fiskaprísir.

Hann sigur at enda, at í fjør var líkamikið, hvør árstíðin var.

– Toskur var at fáa allar tíðir av árinum, men soleiðis er ikki í ár. Tí koma hesir báðir túrarnir undir Íslandi sera væl við hjá okkum.



*Kokkurin, Árni Muller, í brúgvarútinum á Polarstjørnuni – væl nøgdur við góðan fong undir Íslandi*

# Muntra stongt vegna eldsbruna

**Beint fyri klokkan 13 sunnudagin varnaðust fólk, at roykur kom úr takinum úr bygninginum, har eitt nú Resturant Muntra í Fuglafirði húsast**

ELDUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Eldur var uppi á ovastalofti á Resturant Muntra sunnudagin. Fólk varnaðust roykin, sum kom upp ígjøgnum takið. Hol kom á takið, og á myndini sæst, at ein pláta er negld niðuryvir holið*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Á løgreglustøðini í Runavík sigur Jógvan E. Ósá, at sløkkiliðsbilurin í Fuglafirði var skjótur á staðið og fekk bast eldinum, sum stóðst av skamlopi ella kortslutningi uppi á ovastalofti í bygninginum.

Í frágreiðingini hjá løgregluni stendur, at talan var um lítlan eldskaða og nakað royk-og vatnskaða.

Sosialurin var fram við á Muntra mánamorgunin.

Ein lemmur er í loftinum beint undir, har eldurin kyknaði, og haðani fingu sløkkiliðsmenninir bast eldinum.

Hóast eldurin var beint omanfyri, har resturatiónin er á miðhæddini, sást lítið og einki til vatn og royk.

Í durinum við inngongdina sást eitt lítið sindur av sóti, og kanska kendist ein farri av brendum í næsunum.

## Klárt til veitslu

Uppi í resturatiónini stóðu borðini dekkaði við dúkum og øðrum pynti til konfirmatión og veitslu, sum skuldu vera sunnudagin.

Maturin og alt stóð liðugt, tá ið eldur kom í, og streymurin reyk.

Men ráð vóru fyri hesum.

Konfirmatiónin varð hildin heima við hús við mati, sum Muntra hevði gjørt og veitslan, har 18 konfirmantar við makum vóru savnaðir aftur eftir 50 árum, varð hildin í Mentanarhúsinum í Fuglafirði, sum Muntra leigaði til endamálið.

Eisini her stóð maturin liðugur, tá ið fólk varnaðust eldin.

Alt spældi væl av, hóast neyðugt varð at flyta hesi tiltøk úr resturatiónini hjá Poul Rustin, sum í løtuni er burturstaddur.

Væntandi gongur ein vika ella so, áðrenn Resturant Muntra í Fuglafirði letur uppaftur.